# Kendur kokkur leggur frá sær sum lærari

Í hósdagin var móttøka á Klaksvíkar Sjómansskúla í sambandi við, at kendi kokkurin, Jákup Ziskason, legði frá sær sum lærari á skúlanum.

Har var ein hópur av fólki, sum nýtti høvi at heilsa uppá Jákup og takka honum fyri gott arbeiði og annars ynskja honum eina góðan framtíð.

Hann hevur verið lærari á Kokkaskúlanum í Klaksvík í tveimum skiftum.

Hann byrjaði fyrstu ferð í 1972 og helt so fram í 13 ár. Síðani tók hann við aftur í 1994, og gevst nú tann 1. november.

Á móttøkuni varð tosað um, hvussu nógv og ymisk tiltøk í kokkayrkinum Jákup Ziskason hevur skipað fyri og sett á stovn.

Kokkaskúlin hevur verið partur av Klaksvíkar Sjómansskúla til 1. august í ár, tá ið hann varð lagdur undir Tekniska Skúla í Klaksvík – heitið eftir útbúgvingina er nú matvøruástøðingur.

Í løtuni ganga 28 næmingar til hesa útbúgving og teir eru býttir sundur í tveir flokkar. Næmingarnir halda til á Klaksvíkar Sjómansskúla og eru bert fríggjadag á Tekniska Skúla.

Í frítíðini hevur Jákup Ziskason nógv frítíðarítriv, eitt nú seyð, at standa á skí og fótbólt, at ganga uppí.

Á www.portal.fo, eru nógv fleiri myndir frá móttøkuni.



*Jákup Ziskason var undirdíktur í gávum og góðynskjum, tá ið hann legði frá sær sum lærari á Sjómansskúlanum. Men tað skilst, at kokkayrkinum ætlar hann ikki at sleppa. Myndina tók Dávur Winther*

# Avreiðingarvirðið munandi hækkað

**Avreitt í nøgd og virði um avreiðingarskipanina, jan. – sep. 2009 og 2010**

| | Nøgd í tonsum | | | | Virði í 1.000 kr. | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2009 | 2010 | Munur | % munur | 2009 | 2010 | Munur | % munur |
| **Botnfiskur samantalt** | **61.223** | **58.545** | **-2.677** | **-4** | **398.364** | **517.570** | **119.207** | **30** |
| - Toskur | 6.501 | 9.514 | 3.013 | 46 | 78.383 | 133.201 | 54.818 | 70 |
| - Hýsa | 3.654 | 3.705 | 51 | 1 | 32.234 | 41.243 | 9.009 | 28 |
| - Upsi | 42.160 | 33.668 | -8.492 | -20 | 223.183 | 237.287 | 14.103 | 6 |
| - Annar botnfiskur | 8.908 | 11.659 | 2.751 | 31 | 64.564 | 105.839 | 41.276 | 64 |
| **Flatfiskur samantalt** | **4.304** | **3.831** | **-473** | **-11** | **86.959** | **82.772** | **-4.187** | **-5** |
| - Kalvi | 159 | 135 | -24 | -15 | 6.084 | 6.538 | 454 | 7 |
| - Havtaska | 1.359 | 1.565 | 207 | 15 | 33.665 | 38.565 | 4.899 | 15 |
| - Svartkalvi | 2.197 | 1.220 | -977 | -44 | 40.793 | 28.359 | -12.433 | -30 |
| - Annar flatfiskur | 590 | 912 | 322 | 55 | 6.418 | 9.311 | 2.894 | 45 |
| Onnur fiskasløg | 21.699 | 20.817 | -881 | -4 | 81.779 | 87.499 | 5.721 | 7 |
| Skeljadjór | 1.741 | 2.793 | 1.052 | 60 | 7.176 | 7.668 | 492 | 7 |
| Rogn, sil, livur | 314 | 206 | -108 | -34 | 1.624 | 1.285 | -339 | -21 |
| **Samantalt** | **89.280** | **86.193** | **-3.087** | **-3** | **575.902** | **696.795** | **120.894** | **21** |

Níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár er avreiðingarvirðið munandi hægri enn tað var í sama tíðarskeiði í fjør.

Tað sæst í feskastu uppgerðini hjá Hagstovuni og sum er sett á heimasíðu teirra.

Uppgerðin vísir, at vøksturin níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár, aftur ímóti sama tíðarskeiði í fjør, er góðar góðar 120 milliónir, ella áleið 20%.

Tilsamans vórðu avreidd 89.280 tons í hesum tíðarskeiði í fjør, men í ár eru avreidd 86.193 tons, ella 3087 tons færri.

Men avreiðingarvirðið í ár var 696.8 milliónir krónur, aftur ímóti 575,9 milliónir í sama tíðarskeiði í fjør.

Hetta kemst av, at nógv minni av upsa er komið uppá land samanborið við í fjør. Minkingin er eini 20 %.

Men hóast nógv minni er fiskað av upsa í ár, er virðið vaksið. Av toski er nærum helvtina so nógv avreitt í ár, sum í fjør, men avreiðingarvirðið økt 70%. Hýsufiskiskapurin hevur verið nakað tann sami í ár, men avreidda virðið á hýsuni er økt meiri enn einum fjórðing.

Eisini av øðrum botnfiski so sum brosmu, longu og blálongu er bæði nøgd og virðið nógv økt í mun til í fjør.

Av flatfiski er nakað minni avreitt í ár og tilsamans er virðið minkað nakað. Serliga er avreidda nøgdin av svartkalva nógv minni í ár samanborið við í fjør.

Samanumtikið kann staðfestast, at avreiðingarvirðið higartil í ár roynist væl betri fyri at kalla øll fiskasløg um samanborið verður við sama tíðarskeið 2009.

Men her skal leggjast afturat, at samanumtikið var 2009 eitt vánaligt ár, bæði tá talan var um avreiðingarnøgd og fiskaprísir.

Sí annars talvuna

# Íslendingar hava funnið sínar yvirmenn í Føroyum




Íslendingar hava funnið sínar yvirmenn í Føroyum.

Í hvussu so er tá ið tað kemur til at hava strang rúsdrekkalóg.

Tað heldur bryggjarin á Borgarnesi, har føroyska brennivínið Eldvatn og Lívsins Vatn, verður dropadrivið.

Men tað verður gjørt við føroyskum vatni, sum verður ført úr Føroyum vestur um hav á bryggjaríið á Borgarnesi.

Íslendska kringvarpið umrøddi marghháttligu støðuna nú ein dagin og har undraðust tey á strongu reglarnar í Føroyum.

Bryggjarin helt fyri, at føroyingar eru lítið øðrvísi enn íslendingar. Í Íslandi halda tey seg hava besta vatnið í verðini. Føroyar eru ikki langt frá Íslandi og eisini her er nógv, gott vatn.

Men tað er als ikki loyvt at bryggja sterkt í Føroyum. Tí verður vatn ført vestur um hav til Íslands at verða bryggjað og dropadrivið til Eldvatn og Lívsins vatn, tí tað verður marknaðarført sum ein føroysk framleiðsla – sum vit altso noyðast at framleiða í Íslandi har tað verður dropadrivið í stríðum streymi á bryggjaríi á Borgarnesi.

– Vit hildu, at íslendingar høvdu strangastu rúsdrekkalóg í verðini.

Men tað er komið óvart á hann, at vit í Føroyum hava eina uppa aftur strangari lóg.

# Eldur í vaskimaskinu

Á miðdegi í dag varð alt eldsløkkingar- apparatið í Havn sett í sving tí boðað var frá eldi í einum sethúsum.

Tað vísti seg, at tað var í eini tendraðari vaskimaskinum, at eldurin var kyknaður og hann var skjótt sløktur, sigur Annfinn Reinert, innsatsleiðari í sløkkiliðnum.

Húsfólkið var inni og varnaðist eldin rættiliga tíðliga, áðrenn hann fekk gjørt nakað serligt um seg, og fekk sent boð eftir løgregluni.

Eldskaðin er at kalla ongin uttan tað, at vaskimaskinan fór fyri skeytið.

Men eldurin elvdi til nakað av royki sum fór um húsið og hann hevur elvt til nakað av skaða.